SKJAL 3

VINNUMÁLARÁÐIÐ

Fíggjarmálaráðið
Traðargøta 39
160 Argir
Føroyar

Tórshavn, tann 5. september 2013
J.nr.: 13/00023-29
At tilskila í svarið
Viðgjørt: GA
Tygara skriv:

**Fíggjarlógin 2014 – játtanartørvur hjá Strandfaraskipum Landsins**

Sambært avtalu senda vit tykkum kunning um játtanartørvin hjá Strandfaraskipum Landsins.

Niðanfyristandandi tekur útgangsstøði í at varðveita "status quo", tað vil siga, sama tænastustøði (ferðaætlan) og sama ferðaseðla- og farmaprís sum nú.

Í "Á rættari kós" er nevnt, at ætlanin er at kanna møguleikarnar fyri at skipa eitt landsreiðarí og at hetta í longdini møguliga kundi rationaliserað raksturin fyri 5 mió. kr. Endamálið við miðsavnanini av skiparakstrinum var at fáa meira fyri minni, uttan at hetta ávirkaði núverandi tænastustøði.
Ein arbeiðsbólkur hevur kannað møguleikan og er komin til ta niðurstøðu, at tað ikki verður gjørligt at spara 5 mió. kr., m.a. tí at nýtt havrannsóknarskip verður bygt og rikið av privatum veitara og Tjaldrið er nærum ikki í drift. Sostatt er tað bert Brimil, sum kann koma við íkasti til rationaliseringina (sparingina).
Nógv innkeyp verður boðið út sum er, tí er sparingin sera avmarkað við eini samanlegging.

Leiðslan á Strandferðsluni hevur gjørt eina meting av játtanartørvinum fyri at varðveita sama tænastustøði og sama ferðaseðla- og farmaprís sum nú. Hetta er lýst í talvuni niðanfyri.

| | *J 2013 tkr.* | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur | *67.478* | 70 mió. kr. | 70 mió. kr. |
| Rakstrarútrl excl olja | *78.743* | 80 mió. kr. | 80 mió. kr. |
| Oljuútreiðslur | *42.900+7.200* | 50 mió. kr. | 50 mió. kr. |
| inntøkur | *57.275* | 60 mió. kr. | 60 mió. kr. |
| **Játtanartørvur í alt** | ***139.046*** | **140 mió. kr.** | **140 mió. kr.** |

Strandfaraskip Landsins hava tørv á 140 mió. kr. til raksturin (hetta er við oljuprísunum sum eru pt). Í kørmunum fyri 2014 og komandi árini er játtanin:

| | 2014 | 2015 |
|---|---|---|
| Lønarútreiðslur | 67.478 | 67.478 |
| Rakstrarútrl excl olja | 72.272 | 70.056 |
| Oljuútreiðslur | 52.100 | 52.100 |
| inntøkur | 57.275 | 57.275 |
| **Játtan í alt** | **134.575** | **132.359** |

Í kørmunum fyri 2014 liggur inni, at sparast skulu 3 mió. kr. afturat (í 2013 er 1 mió. kr. spardar) vegna landsreiðarí, umframt at tillaga ferðaætlaina hjá Teistanum fyri at spara í manning, soleiðis at hann hevur tvær manningar fulla tíð. Í dag eru tríggjar manningar sum starvast 0,89 %, umframt at eyka summartúrurin hjá Smyrli verður avtikin (hetta skuldi setast í verk í 2013).

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 30 66 00 • TELEFAX 30 66 65 • E-MAIL: VMR@VMR.FO

VINNUMÁLARÁÐIÐ

Í 2015 liggja sjálvsagt somu sparingar inni, umframt 1 mió. kr. afturat frá ætlaða landsreiðaríinum og 1,1 mió. kr. sum stava frá at nýggja Nólsoyarferjan verður sett í sigling. Hetta sær tó út til at halda, av tí at hon er bíligari í rakstri og manningartalið er lægri.

Vinnumálaráðið kann eisini vísa á, at økta játtanin kann fíggjast og harvið verða útreiðsluneutral fyri landskassan frá øktum inntøkum av víddargjøldum – konta 20.52.3.10 undirkonta 11.

**Samanumtøka:**
Eftir at hava kannað møguleikarnar fyri at skipa eitt landsreiðarí, eru vit komin til ta niðurstøðu at umstøðurnar gera, at hetta ikki kemur at skapa stórvegis íkast til ætlaðu sparingina.

Ynskið er at tænastustøðið hjá SSL verður varðveitt og at ferðseðla- og farmaprísurin ikki hækkar.

Mælt verður til, at játtanin hjá SSL verður hækkað við 5 mió. kr. í 2014 og 6,1 mió kr. í 2015.

Hetta kann gerast útreiðsluneutralt, við tað at inntøkurnar frá víddargjøldum eru hægri enn mett.

Vinarliga

Gunnleyg Árnafjall
fíggjarfulltrúi